## DAGSINS MEINING

# Støðið rillar

Avgerðin hjá europeiska mannarættindadómstólinum um úrvalssáttmálar hevur skakað fakfelagsumhvørvið í Norðurlondum. Avgerðin tekur støðið undan elligamlari sáttmálabundnari siðvenju í Norðurlondum. Sambært hesa siðvenju, ið sum nevnt oftast er staðfest í avtalum, kunnu arbeiðsgevarar bert seta fólk í arbeiði, sum eru limir í fakfelag, sum viðkomandi arbeiðsgevari hevur sáttmála við. Við hesi avgerð dómstólsins rillar støði undir allari fakrættarligu skipini í Norðurlondum og sostatt eisini í Føroyum.

Úrvalssáttmálin hevur medvirkað til at tryggja friðin á norðurlendska arbeiðsmarknaðinum. Meginreglan í úrvalssáttmálum hevur lutvíst verið við til at forða arbeiðsgevarum at nýta arbeiðsmegi úr einum fakfelag til at taka upp verkfallsrakt arbeiði. Meginreglan hevur hartil mótvirkað spjaðing í fakfelagsrørslunum. Hetta hevur sjálvsagt havt týdning fyri løntakarasíðuna. Uppaftur størri týdning hevur tað tó havt, at arbeiðsgevarin bert hevur havt ein og sama part at samráðast við. Hetta hava norðurlendskir arbeiðsgevarar yvirhøvur mett sum ein stóran fyrimun. Tað hevur sostatt ikki verið fyri bláu eygu løntakara, at arbeiðsgevarar hava gjørt úrvalssáttmálar. Heldur hevur hetta verið tí, at tað henda skipan hevur verið mett sum tann hentasti myndilin – eisini fyri arbeiðsgevarasíðuna.

Tað er, sum flestøllum kunnugt, stórur munur á skipanum arbeiðsmarknaðarins í Norðurlondum øðrumegin og so Suðureuropa hinumegin. Suðureuropeiski arbeiðsmarknaðurin hevur verið og er framvegis eyðkendur av nógvum fakfeløgum innan sama øki. Men rákið tey seinastu mongu árini hevur tó gingið móti norðurlendska leistinum. Skipanin í Suðureuropeiska arbeiðsmarknaðarkervinum hevur ikki tryggjað eina serstakliga støðuga skipan. Hesin arbeiðsmarknaður er eyðkendur av órógv, afturvendandi samráðingum og nógvum verkføllum. Ein av mongum orsøkum til hesa støðu er júst tann sera samansetta skipanin við fleiri fakfeløgum innan sama øki - tað veri seg kristilig, sosialdemokratisk, kommunistisk, liberal, you name it! Tað er tí ikki heilt lætt at skilja, hví føroyska arbeiðsgevarasíðan eintýtt fegnast um avgerðina um úrvalssáttmálar hjá mannarættindadómstólinum. Henda avgerð fer ikki at gera støðuna á t.d. danska arbeiðsmarknaðinum léttari. Hinvegin er avgerðin eingin vanlukka fyri føroyska løntakaran. Men avgerðin fer at seta uppaftur størri krøv til leiðslurnar at útvega limum fyrimunir og trygd. Um leiðslurnar megna hetta er neyvan vandi fyri nógvum feløgum innan sama øki útyvir ta geografisku spjaðing, sum longu er frammanundan. Avgerðin um úrvalssáttmálar hevur eina sera áhugaverda fylgju í Føroyum. Avgerðin merkir, at føroyska fakfelagsrørslan nú verður noydd til at samskipa seg í eitt ella fleiri meginfeløg. Um ikki feløgini á privata arbeiðsmarknaðinum nú finna saman í eitt føroyskt LO, kann støðan skjótt gerast hættislig fyri ikki at siga beinleiðis anarkistisk. Finna feløgini hinvegin saman fær arbeiðsgevarin ein enn sterkari mótpart í framtíðini. Men hann fær eisini meira skipað viðurskifti, so nú ræður um hjá pørtunum at halda høvdini køld og at hugsa seg væl um, áðrenn strategi verður løgd.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fjern homoFObia!



**OLE WICH**
Listarmaður

**Jeg binder nu en sløjfe på mit kunstprojekt om homoseksuelle på Færøerne. Men problematikken og emnernes aktualitet fortsætter**

### Det åbne samfund

Det stopper ikke før alle forstår, at de væsentligste parameter for Færøernes udvikling i fremtiden er tolerance, fri debat og åbenhed. Det er dette, der skal forandre og støtte den politiske virkelighed frem mod større selvstændighed. Disse forhold vil i fremtiden være lige så vigtige som økonomi og bosætningsmuligheder.

I talentmasses variation og størrelse ligger fremtiden. Hvis ikke samfundet kan tiltrække og holde på denne essentielle og vigtigste ressource, så stagnerer landet.

### Talentpleje

Den færøske talentmasses optimale betingelser opnås ved at alle medlemmer af samfundet føler at alle slags mennesker har en fuldgyldigt plads i der færøske samfund uanset etnisk baggrund, race, tro eller seksuel orientering. Alle må forstå at det moderne og levedygtige samfund er et spraglet tæppe, hvor trenden er demokrati med en høj tolerancetærskel og islættet er menneskelig mangfoldighed og aktivitet.

### De homoseksuelle og den færøske historie

Jeg har flere gange talt om ar der mangler positive signaler fra det officielle Færøerne til de homoseksuelle. Der skal sendes nogle klare signaler, der indikerer at de er accepteret som en del af den færøske kulturarv og accepteret i nutidens og fremtidens samfund.

De homoseksuelle har været bemærkelsesværdig tavse i den forløbne debat og vi kan kun gisne om grunden til dette. Faktisk ved vi alt for lidt om de færøske homoseksuelles situation.

Vi ved også meget lidt om deres historie. I et så fortidsinteresseret land som Færøerne er det mærkeligt at de homoseksuelle er fraværende i den færøske historie.

### Opfordring til kulturminister Jógvan á Lakjuni

Jeg vil her opfordre kulturministeren til at bevirke, at der bliver fremsat et forslag i Føroya Løgting om bevilling til registrering og publicering af de færøske homoseksuelles historie. Vi har alle behov for at blive klogere på de homoseksuelles situation før og nu.

Vi er så heldig at have talentfulde folk, der kan udføre en sådant arbejde. Jeg vil foreslå tekstfolkene Sonja Jógvansdóttir, Froði Holm Knudsen og grafikeren Dennis Agerblad/Ova til denne opgave. De bor alle udenlands for tiden, men jeg er sikker på de ville være glade for at tilbringe en arbejdsperiode her i landet med en spændende opgave. Eventuelt kunne de samarbejde med Fróðskapasetrið om indsamling og registering af data.

### Fjern homoFObia!

homoFObia billederne ligger nu på tusinder af computere. De beskriver virkeligheden og forstyrrer folks trang til at feje problemet om de færøske homoseksuelle ind under gulvtæppet. Disse billeder kan ikke fjernes og vil først miste betydning, når deres sandhedsværdi udhules af faktiske forbedringer for de homoseksuelle. Den proces ligger uden for min rækkevidde. Det er en samfundsopgave.

Indtil det færøske samfund kommer med tydelige tegn, der i ord og handling viser at homoseksuelle er fuldgyldige medlemmer af det færøske samfund, vil homoFObia materialet ligge på min hjemmeside www.olewich.com og jeg vil stadig arbejde for at udbrede dem.

Billederne vil ligge der som skamstøtter over et samfund, der ikke tager sit demokratiske ansvar alvorligt og tillader religiøs fanatisme og generel intolerance at influere på landets love og administration.

Jeg ser frem til den dag jeg kan fjerne filerne fra min hjemmeside og gøre mit kunstprojekt til historie. Hjælp mig med at fjerne homoFObia.

### Tak for kampen

Jeg vil her takke de mange, mange mennesker, der har kommet med sympatitilkendegivelser i form af mails og personlig kontakt.

Jeg vil også takke de få, der har skældt mig ud. Specielt vil jeg takke Bill Justinussen for vores diskussioner og hans store hjælp til at udbrede homoFObia. Og Jón „gå efter manden i stedet for bolden" Ellendersen vil jeg takke for hans klokkeklare påvisning af at færøsk debatmiljø endnu kræver store forbedringer.

Om tavshed som udtryksmiddel vil jeg sige, at det er direkte nedbrydende for et levende samfund.
www.olewich.com

*post@wichgrafik.dk*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa ræ ttuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.